# Koyrdi í Hoyvíkstjørn



*Hóast hált var ta løtuna, óhappið hendi, so er lítil ivi um, at ov nógv ferð var orsøkin, at hesin Toyota Corollabilurin endaði í Hoyvíkstjørn hóskvøldið*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Ein ungur maður, sum kom koyrandi niðan eftir Hoyvíksvegnum í Havn hóskvøldið, misti tamarhaldið á bilinum, sum fór út av vegnum – og endaði í Hoyvíkstjørn**

FERÐSLUÓHAPP
*Eirikur Lindenskov*

– Vit vórðu hjartkipt, tá vit sóu bilin koma slingrandi niðan eftir vegnum. Hann slongdist frá høgru til vinstru, og vit gjørdu okkum til reiðar at leypa undan honum.

Soleiðis greiðir eitt eygnavitni Sosialinum frá. Maður og kona spákaðu í ovaru síðu á Hoyvíksvegnum, tá bilurin kom sleingjandi ímóti teimum.

Eygnavitnið greiðir frá, at tað var hált ta løtuna, óhappið hendi.

Bilurin hevur uttan iva havt ov nógva ferð, tá bilførarin misti tamarhaldið á bilinum, sum snúraði runt á vegnum.

Bilurin fór sleingjandi tvørtur um gongubreytina í niðaru síðu, reiv stikið við sær oman av bakkanum, har hann slongdist tvørtur um gøtuna fram við tjørnini, til hann steðgaði við hjólunum í høgru síðu niðri í Hoyvíkstjørn.

Bilførarin, sum var einsamallur í bilinum, slappa uttan mein.




UTTAN ÚR HEIMI

## Pávin krevur ísraelska afturtøku

ÚTLAND
*Fartekst*

Vatikanið sigur í einari kunngerð, at tað verður eingin friður í Miðeystri, fyrr enn ísraelski herurin tekur seg aftur av teimum hersettu økjunum.

Kunngerðin frá Vatikaninum kom, beint eftir at Jóhannes Páll pávi hevði havt fund við katólskar leiðarar í Miðeystri, sum eru komnir til Rom at tosa við pávan um tey spentu viðurskiftini millum ísraelsmenn og palestinar.

Í einari røðu fyri leiðarunum fordømdi pávin harðskapin hjá báðum pørtum. Hann segði, at fólkið á leiðini verður oyðilagt av einum stríði ímillum tvær víðgongdar hugsjónir, sum vanvirða tað heilaga landið.

Pávin segði, at tað verður ikki friður í Miðeystri, fyrr enn Ísrael tekur seg aftur av teimum hersettu økjunum, og palestinar fáa sítt egna ríki.

## -Tað gekk betur enn væntað

ÚTLAND

Sjónbandsupptøkan við bin Laden prógvar sambært amerikanarunum, at tað var hann, sum legði atsóknirnar 11. september til rættis.

Á bandinum sigur Osama bin Laden, at hann og menn hansara settu seg við útvarpslurtið tann 11. september, og at teir stutt eftir hoyrdu í tíðindunum, at eitt flogfar hevði rakt World Trade Center.

-Eg bað teir geva tol eina løtu, og so hoyrdu vit, at eitt flogfar afturat hevði rakt bygningarnar. Brøðurnir vóru ovurfegnir um tíðindini, greiðir bin Laden frá á bandinum.

Hann sigur eisini frá, hvussu hann og hansara menn høvdu roynt at rokna út, hvussu nógvir fíggindar fóru at doyggja í álopinum. Sjálvur hevði hann væntað, at flogførini fóru at oyðileggja tríggjar ella fýra hæddir í bygningunum, men at tann nógvi eldurin frá flogfarabrennievninum fór at gera, at tær ovaru hæddirnar fóru at rapa. At bygningarnir rapaðu í grund, hevði hann ikki væntað.

Amerikanarar siga, at sjónbandið varð funnið í einum húsum í býnum Jalalabad, men at upptøkan ætlandi er gjørd í Kandahar í november. Hvussu amerikanarar hava fingið fatur á bandinum, vilja teir ikki siga.

Eygleiðarar siga tað vera heilt vist, at bin Laden visti, at orðaskiftið varð sjónbandað, og at hann eisini ætlaði, at tað skuldi koma fram alment.

Hinvegin ivast fleiri amerikanskir fjølmiðlar í, at upptøkan er ektað.

Stóra sjónvarpsstøðin CNN vísti eisini á, at á sjónbandinum sigur bin Laden ikki, at tað var hann, sum skipaði fyri álopinum. Upptøkan er gjørd langt eftir tann 11. september, og hann visti tí alt, sum var farið fram, segði CNN.



# Pætur til danska Grand Prixið

**Dagin fyri at freistin fyri at lata sangir inn til danska Grand Prixið var úti, hevði Pætur við Keldu hug at gevast við síni roynd at sleppa við, men hann gjørdi sangin lidnan, og nú er hann komin gjøgnum nálareygað**



*– Tað kom óvart á meg, at sangurin skuldi sleppa við. Sjálvandi vónaði eg tað, men kappingin er hørð, og 650 sangir vóru vrakaðir hesaferð. Eg eri sera fegin um hetta, sigur Pætur við Keldu*

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*

Í gjár kom Pætur við Keldu til Føroya. Hann kom heim í føðingardag hjá mammu síni. Í viðførinum hevði hann eitt atgongumerki til danska Melodi Grand Prixið, eftir at hansara sangur var ein av teimum 10, ið var valdur út millum 662 sangir. Lagið er lætt og melodiøst, og yrkingina gjørdi hann við mammu síni í huga.

Men tað var um reppið, at Pætur als ongan sang sendi til Grand Prixið.

– Eg hevði skrivað eitt lag, sum eg hevði spælt inn á harddisk-upptakaran hjá mær sjálvum. Eg setti meg so í samband við Hans Poulsen fyri at fáa hann at taka um endan við tónleikinum. Dagin fyri, at sangurin skuldi latast inn, hevði eg næstan mist mótið. Vit høvdu gjørt tónleikin lidnan, men eg skuldi skriva eina tekst og syngja hann, greiðir Pætur frá.

– Eg hevði hug at gevast og bíða eitt ár við senda ein sang inn. Eg tosaði við Hans um hetta, men hann var framvegis heitur upp á at gera sangin lidnan, og so helt eg, at tað skuldi ikki stranda upp á meg.

### Drúgt at bíða

Yrkingin »Som en drøm« varð skrivað, og sangurin varð gjørdur liðugur, pakkaður og sendur Danmarks Radio, sum stendur fyri Grand Prix tónleikakappingini í Danmark.

Um vikuskiftið komu boðini um, hvussu sangurin hevði staðið seg í kappingini við meira enn 650 aðrar. Ein av teimum, sum fyrireikar Grand Prixið, ringdi til Pætur.

– Eg sat í stovuni hjá mær, tá telefonin ringdi. Eg var kløkkur, tá eg hoyrdi, at tað var frá Danmarks Radio. Hann tók sær góða tíð at forklára, at nú høvdu teir lurta eftir øllum sangunum og tikið støðu til, hvørjir sangir skuldu við og so víðari. Eg haldi, at hann argaði meg, og eg hugsaði bara, kom so við tí.

Og so komu boðini. Sangurin hjá Pætur skuldi við til Grand Prixið.

– Tað kom óvart á meg, at sangurin skuldi sleppa við. Sjálvandi vónaði eg tað, men kappingin er hørð, og 650 sangir vóru vrakaðir hesaferð. Eg eri sera fegin um hetta, sigur Pætur við Keldu.

### Spælt nógv

Pætur við Keldu er ómetaliga gávuríkur sangari, klaverspælari og sangskrivari. Hann er ættaður úr Klaksvík, sonur Betty og Jógvan við Keldu, og hevur meginpartin av tíð síni búð í Klaksvík. Nú er hann búsitandi í Keypmannahavn, har hann fæst við tónleik, umframt at hann arbeiðir.

Pætur byrjaði tíðliga at spæla klaver, og hann hevur spælt og sungið nógv saman við systrunum og systkinabarni, og tey góvu út eina andaliga fløgu undir navninum Tiðnað fyri nøkrum árum síðani.

Eftir tað spældi Pætur inn eina solofløgu, har hann fyri tað mesta syngur og spælur klaver. Hendan útgávan kom í 1998 og kallast Simplicity. Á hesi fløgu eru nakrir framúr vakrir sangir, sum Pætur hevur skrivað og syngur.

Í august mánaði í ár var Pætur ein av teimum, sum hitaði upp fyri Brøðurnar Olsen, sum spældi í Havn. Donsku gestirnir vóru ovfarnir av framførsluni hjá Pæturi, sum sat einsamallur við klaverið og sang sínar sangir, og eftir konsertina var umboðsmaðurin hjá Olsen-beiggjunum áhugaður í at fáa meira at vita um hendan gávuríka tónleikaran.

### Luttøkan skal brúkast rætt

Hóast nógv fólk kenna tónleikin hjá Pæturi, ber tað ber ikki til at siga, at Pætur hevur fingið nakað veruligt gjøgnumbrot í Føroyum. Men tað fer hann ivaleyst at fáa við luttøkuni í Grand Prixnum. Spurningurin er bara, hvussu langt hendan luttøkan kann bera.

– Eg vil gjarna liva av tónleiki, men tað ræður um at velja rætt og duga at brúka luttøkuna í Grand Prixnum til nakað, heldur Pætur.

Enn er ikki greitt, um Pætur sleppur at syngja sangin hjá sær sjálvur. Tað verður ikki gjørt endaliga av fyrr enn 4. januar, tá luttakaralistin verður almennur. Ikki øll tey, sum syngja innsendu sangirnar, sleppa at syngja teir til Grand Prixið.

Tað, sum Pætur hevur fingið váttan fyri, er, at hansara sangur verður við. Kemur tað upp á tal, er Pætur sinnaður at syngja sangin sjálvur.

Danska Melodi Grand Prixið 2002 verður leygarkvøldið 9. februar, og man Sjónvarp Føroya ikki fara at senda tað beinleiðis, nú føroyski áhugin fyri tiltakinum fer at vaksa munandi.

## Stóðu seg væl í 1979

**– Tað er sera hugaligt at frætta, at ein føroyskur tónleikari nú skal luttaka í Grand Prixnum aftur. Eg vóni, at hann fer at standa seg væl, sigur Jógvan Telling Joensen, sum var við í danska Grand Prixnum í 1979**

1979
*Eyðun Klakstein*

Annika Hoydal sang í 1979 sangin Aldan til danska Melodi Grand Prixið, og hesin sangurin gjørdist nummar trý. Framman fyri vóru so kendir mans sum Tommy Seebach og Kim Larsen.

Jógvan Telling Joensen spældi saman við Anniku Hoydal til Grand Prixið, og hann minnist tað sum eina sera spennandi tíð.

– Vit búðu nirði um tað mundið, og vit vórðu boðin við sum umboð fyri Føroyar. Grand Prixið gekk fyri seg í einum stórum studio hjá Danmarks Radio, og tað var stuttligt at at verða millum allar teir kendu tónleikararnar, sum eisini luttóku, minnist Jógvan Telling Joensen.

### Vónar tað besta

– Tað er sera hugaligt at frætta, at ein føroyskur tónleikari nú skal luttaka aftur. Eg vóni, at hann fer at standa seg væl og verður eitt gott umboð fyri føroyingar, sigur hann.

Í 1979 ynskti Danmarks Radio at gera eitt øðrvísi Grand Prix, eftir at tónleikurin var vorðin ov einstáttaður árini frammanundan. Tí vóru umboð fyri Føroyar og Grønland eisini boðin við.

Og meira enn 20 ár eftir hetta skal aftur ein føroyingur taka lut, og so verður spennandi at vita, um hann fer at standa seg eins væl og Annika og tey gjørdu.

